# Okkara sjálvútvalda og aggressiva paradís

**KLUMMA**

*Heini í Skorini*



Mynd: Sunva Ey. Lassen

So var hon aftur her. Tjóðarhátíðin mikla. Til minnis um ein ungan krígssinnaðan víking, Ólavur Haraldsson at navni. Sum møtti Hinum Alvalda og varð doyptur í Norðurfraklandi. Sum síðani gjørdist Noregs kongur. Og sum eftir deyða sín á Stiklastøðum gjørdist halgimenni.

Men krossferðin í Føroyum var langt síðani byrjað, tá Ólavur Haraldsson hin heilagi sá ljósið. Hógvar sukku í svørðin og kyndlar glampaðu í náttini, tá Sigmundur og vápnaðu krossfarar hansara fóru frá garði og løgdu oyggjarnar inn undir seg. Trúgv ella doyggj. Við ella ímóti. Eins og tá Bush berjist ímóti skeggjutu riddarum Muhammeds. Jahve gjørdist gudur í Føroyum. Og túsund ár seinni stendur jihadisturin Sigmundur úti við Vesturkirkjuna og fylgir við, hvussu leikur fer við tí arvi, sum hann við svørði í hond stovnsetti í Føroyum.
Eru tað okkara fyrimyndir?

Men okkurt mugu vit jú minnast. Vitleyst er søguleyst fólk. Og á ólavsøku minnast og hátíðarhalda vit okkara felags tjóðskaparliga samleika og uppruna. Øksl við øksl eru vit fyrst og fremst *føroyingar*.

Føroyingar. Hvat er tað? Hvørji virði ella eginleikar knýta vit at orðinum *føroyskleiki?*

Er tað grindadráp, føroyskur dansur, Kirkjubømúrurin og føroysk klæði? Er tað Landskrona, Eivør, G! og Pipar og Salt? Ella er tað blokkstuðul og heimastýrislóg, §266b, ókeypis fiskiloyvi og ivasamar bankasølur?

Tað veldst væl um, hvønn tú spyrt.

Av tingsins røðarapalli verður sagt, at Føroyar eru eitt *paradís*. Hvørki meiri ella minni. Og í einum paradísi finst einki ónt. Føroyar eru ein grønur blettur av reinleika og sakloysi. Ódálkaðar av heimsins forfalli eru vit vælsignaði við eini landafrøðiligari og mentunarligari avbyrging, so vit ikki eru gliðin við niður í heimsins díki. Glíðibreytin hevur enn ikki eitrað okkum. Syndanna kavabóltur er enn ikki farin á rull. Og nú ræður um at verja borg.

Í hugsjónarligum kroysum royna politikarar at halda lív í tjóðskaparligu gudasøgnini um eina føroyska *eindarmentan*. Sambært hesum eru vit einlittir borgarar í einum einlittum paradísi. Soleiðis skal tað vera. Og alt, sum ikki váttar hesa sjálvsfatan, skal kúgast. Litirnir skulu køvast. Frábrigdini fjalast. Munirnir viskast út.

Og meðan tey fjáltrandi geyla um paradís og skammleyst erpa sær sjálvum, rópa niðurundirkomnir borgarar um hjálp. Sálarsjúk rekast fyri vág og vind, tí politikarar okkara ikki finna útav at ogna teimum hóskandi stovn. Einligar føroyskar møður liva undir fátækramarkinum hjá ES. Ólukkuligir útlendingar eru dømdir til eitt lív á pínubonkinum, tí lagnur teirra liggja í eini skuffu í Innlendismálaráðnum og støvast.

Samkynd rýma av landinum. Einki tilboð var til tann atferðartrupla lítla Petur. Eingir stovnar eru til taks fyri hundraðtals gomul, sum liggja á B7 ella hjálparleys heima við hús. Og við jøvnum millumbilum stingur fremmandahatrið sítt grima andlit fram.

*Paradís?* Neyvan. Men paradísprofetarnir eru vorðnir meistarar til at lúgva í felag. Fyri sær sjálvum. Og fyri okkum øðrum. Tað er tað, teir eru valdir til. At halda lív í og hjúkla um okkara fyrigyklaðu sjálvsfatan. Og marsjerandi móti einum øðrum paradísi deila teir himmalrópandi veruleikafjarar villingarsjónir um eitt samfelag av samvorðnum menniskjum.

Hetta *paradísið* er av sonnum eitt sjálvvalt og aggressivt paradís. Eitt paradís, hvørs íbúgvar hava eina býttisliga og ógrundaða trúgv á, at vit eru føroyingar serstøk tjóð. Ein skeiklað nationalisma, sum letur seg saman og glorifiserar sítt egna. Tað ónda er óføroyskt. Og trupulleikarnir koma allir uttanífrá. Vit tola ikki lívsførslur, sum ikki vátta, at vit eru best. Og hendan kroniska føroyska neurosan ger okkum til eitt andaligt menningarland, sum ikki megnar avbjóðingarnar í alheimsgerðini.

Sjálvhypnotiserandi sangurin um reinleikans móðurland trívist eisini væl á ólavsøku. Men undir yvirflatuni dagar ein tjóðskaparlig sjálvsfatan, sum ikki tolir aðra talu enn sína egnu. Og sum harðrent saksar tað niður, sum ikki váttar og stuðlar uppundir gudasøgnina um, at Føroyar eru sakloysisins *paradís*.

Gævi føroyingurin viðurkendi, at okkara frelsa kann gerast okkara fortaping. At okkara vælsignilsi kann gerast okkara forbannilsi. At tað ónda ikki altíð kemur uttanífrá.


